# MB smádreingir á Football Festival

Football Festival verður í Århus í døgunum 22. til 26. juli. Tað verða 200 lið frá 21 londum við í ár. Liðini koma úr Onglandi, Filipinunum, Finlandi, Uganda, Ukraina, Grønlandi, Tjekkia og Norðanlondum. Hetta er 3. størsta stevna, sum er í Norðanlondum. Á hesi stevnu luttaka smádreingirnir hjá MB. Liðið er mannað av miðvingum og sørvingum. Leikararnir gista á einum skúla, Vejlby Skole, á ferðini. Liðið fer avstað við flogfari mánamorgunin 21. juli og kemur aftur sunnukvøldi 27.juli.

# Todi keypir tvíburar

25 ára gomlu tvíburarnir Søren og Morten Nielsen frá Køge fara eftir øllum at døma at spæla við FC Amager. Tað skrivar danska heimasíðan bold.dk. Teir báðir hava altíð spælt við Køge, men roknað var við, at teir nú fóru at spæla við Herfølge. Hetta sær nú út til at vera av ongum, tí fyrrverandi ungdómslandsliðsleikararnir eru nú á veg út á Amager, har teir vandu við í gjár.

## FAKTA

**EB/Streymur – Manchester City 0-2 (0-2)**
UEFA Cup fyrri dystur í 1. innleiðandi umfari
Hósdagin 17. juli kl. 19.00 á Tórsvølli í Tórshavn
**Dómarakvartett úr Sveits:** Nicole Petignat, Raffael Zeder, Juan Lozano og Bruno Grossen.
**UEFA eygleiðari úr Danmark:** Jan Carlsen.
**UEFA dómara eygleiðari úr Íslandi:** Gudmundur Petursson.
0-1: Martin Petrov, 9.
0-2: Dietmar Hamann, 28.
**EB/Streymur:** 1. René Tórgarð – 15. Bárður Olsen, 8. Egil á Bø, 12. Marni Djurhuus, 23. Leif Niclasen – 22. Arnbjørn Hansen, 2. Anders Post Jacobsen (18. Brian Olsen, 76.), 7. Levi Hanssen, 6. Fróði Clementsen, 11. Hans Pauli Samuelsen (14. Hanus Eliasen, 76.) – 3. Peter Foldgast (5. Dánjal Davidsen, 85.)
**Gul kort:** einki
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Magnus Poulsen, 26. Tonny Snogebæk Kruse, 88. Marcell Balog, 8. Mikkjal K. Thomassen.
**Venjarar:** Sigfríður Clementsen og Magni Mohr.
Manchester City: 25. Joe Hart – 4. Chinedum Onuoha, 2. Micah Richards, 22. Richard Dunne, 3, Michael Ball – 7. Stephen Ireland, 21. Dietmar Hamann (28. Gelson Fernandes, 74.), 6. Michael Johnson, 17. Martin Petrov – 12. Darius Vassel, 14. Silva Jo (33. Ched Evans, 74.)
**Gul kort:** 6. Michael Johnson.
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Kasper Schmeichel, 5. Vedran Corluka, 11. Elano Blumer, 27. Mwaruwaru Benjani, 30. Nery Castillo.
**Venjari:** Mark Hughes.

**Dinamo Tbilisi-NSÍ 3-0 (3-0)**
UEFA Cup fyrri dystur í 1. innleiðandi umfari
Mikudagin 16. juli kl. 18.00 á Boris Paichadze leikvøllinum í Tbilisi
1-0: Guram Kashia, 7.
2-0: Oleg Gvelesiani, 10.
3-0: David Odikadze, br. 30.
**Dómarakvartett úr Serbia:** Ninoslav Spasic, Vladimir Jovanovic, Cedomir Milis og Milorad Mazic.
**UEFA eygleiðari úr Kypros:** Andreas Akkelides
**UEFA dómaraeygleiðari úr Bulgaria:** Stefan Ormandjiev
**Dinamo Tbilisi:** 12. Didier Janvier Ovono Ebang – 26. Georges Edouard Akiremy Owondo (11. Mate Vatsadze, 53.), 4. Aleksandr Intskirveli, 21. Oleg Gvelesiani, 18. David Digmelashvili, 22. Shota Kashia, 8. Levan Khmaladze (3. Gulverd Tomashvili, 81.), 7. Guram Kashia, 20. Giorgi Nergadze, 49. David Odikadze, 10. Giorgi Merebashvili (23. Nikoloz Pirtskhalava, 53.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 1. Giorgi Loria, 5. Nikoloz Jishkariani, 14. Zviad Kantaria, 15. Donald Dering Djousse,
**Gult kort:** Giorgi Merebashvili 53., Aleksandr Intskirveli 73.
**Venjari:** Rainer Zobel
**NSÍ:** 1. Tórður Thomsen – 2. Aco Pandurovic, 3. Óli Hansen, 8. Jóhan Troest Davidsen, 12. Einar Hansen – 14. Bogi Løkin, 7. Nenad Stankovic, 6. Milan Pejcic (18. Sjúrður Jacobsen, 81.), 14. Bogi Løkin – 16. Øssur Dalbúð (4. Pól Jóhannes Justinussen, 86.), 9. Károly Potemkin (15. Filip E. Jacobsen, 46.)
**Gult kort:** Tórður Thomsen 29., Óli Hansen 33., Einar Hansen 84.
**Reytt kort:** Tórður Thomsen 90+2 (2 gul)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** eingin
**Venjari:** Pauli Poulsen

# Torkil legði hart út

**Torkil Veyhe vann fyrsta teinin í Statoil Kring Føroyar súkklukappingini, sum varð súkklaður í Eysturoynni í gjár. – Eg valdi at vera aggresivur í mínum álopum, sigur Torkil Veyhe**



*Eg kom væl frá byrjan, og valdi at koyra á so leingi eg megnaði, sigur Torkil Veyhe*

SÚKKLING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fyrsta umfar í Statoil kring Føroyar varð súkklað í gjár. Byrjað var í Hósvík og súkklað varð um Eiðisskarð til Oyndarfjarðar, víðari til Leirvíkar og síðani til Runavíkar, har koyrt varð eina ferð runt Agnið, áðrenn komið varð á mál við Statoil-støðina í Saltangará. Tilsamans umleið 100 kilometrar.

Torkil Veyhe kom fyrstur á mál, og súkklaði teinin uppá tríggjar tímar, 30 minuttir og 32 sekund. Ungi havnamaðurin var tvey sekund framman fyri íslendingin Hafsteinn Ægir Geirsson, sum hevur vunnið Statoil Kring Føroyar tvey tey síðstu árini. Nummar trý var Gudmundur Joensen við tíðini tríggir tímar, 34 minuttir og tvey sekund.

Rás2 hevði Torkil Veyhe á tráðnum í morgun, og vinnarin frá í gjár segði, at tað hevði stóran týdning hjá honum, at hann vann í gjár.

– Tað gekk væl, haldi eg. Eg kom væl frá byrjan, og valdi at koyra á so leingi eg megnaði, greiddi Torkil frá. Havnarmaðurin valdi at vera aggresivur í álopum sínum, og tað gav úrslit.

### Einki problem

Hóast teinurin í gjár var lá um 100 kilometrar, og súkklað varð millum annað um Eiðisskarð, helt Torkil Veyhe ikki, at tað var ein serliga trupul teinur. – Seinnapartin í dag súkkla vit so einkultstart á Sandoy, og har vóna vit tað besta, segði Torkil Veyhe við Rás2.

Tilsamans 20 súkklarar kappast í stóru Statoil Kring Føroyar súkklukappingini, sum byrjaði í gjár. Í fýra dagar skulu luttakararnir súkkla tilsamans 325 kilometrar í Eysturoy, Sandoy, Suðuroy og Streymoy. Í dag verður súkklað í Sandoynni, kappast verður í tíðarkoyring, tilsamans 27 kilometrar. Starturin og málið eru við Statoilstøðina á Sandi.

## Úrslit av Statoil Kring Føroyar 1. teinur 17-07-2008 113 km.

**Hósvík – Sundalagið - Norðskála - Eiðisskarð - Funningur - Skálabotn - Oyndarfjørð - Skálabotn - Gøtueiði - Lervík - Gøtueiði - Runavík - Toftir, runt Agnið - Runavík**

| Nr. | Navn | Felag | Árg. | Bólkur | Tíð | Km/t |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Torkil Veyhe | Tórshavnar Súkklufelag | 1990 | Opin bólkur | 03:30:32 | 32,20 |
| 2 | Hafsteinn Æ. Geirsson | Hjólreiðafélagi Reykjavíkur | 1980 | Opin bólkur | 03:30:34 | 32,20 |
| 3 | Gudmundur Joensen | Føroya Triathlonfelag | 1983 | Opin bólkur | 03:34:02 | 31,68 |
| 4 | Kjartan Egholm | Aalborg Cykel Ring | 1967 | Opin bólkur | 03:35:50 | 31,41 |
| 5 | Eli J. Christiansen | Tórshavnar Súkklufelag | 1985 | Opin bólkur | 03:35:50 | 31,41 |
| 6 | Áslakkur Nesá | Slagelse Cykel Ring | 1980 | Opin bólkur | 03:35:50 | 31,41 |
| 7 | Gunnar Dahl-Olsen | Tórshavnar Súkklufelag | 1965 | Opin bólkur | 03:41:22 | 30,63 |
| 8 | Gunnlaugur Jonasson | Hjólamenn | 1962 | Opin bólkur + 45 | 03:48:15 | 29,70 |
| 9 | Súsanna Skylv Sørensen | Føroya Triathlonfelag | | Opin bólkur | 03:48:25 | 29,68 |
| 10 | Andrass Joensen | Føroya Triathlonfelag | 1963 | Opin bólkur + 45 | 03:48:27 | 29,68 |
| 11 | Christian Guttesen | Filskov Cykel Klub | 1979 | Opin bólkur | 03:51:20 | 29,31 |
| 12 | Durita Holm | - | | Opin bólkur | 03:51:38 | 29,27 |
| 13 | Jóhann Brend | CK Kronborg | 1970 | Opin bólkur | 03:53:10 | 29,08 |
| 14 | Sverri Mohr Edvinsson | Tórshavnar Súkklufelag | 1965 | Opin bólkur | 03:54:58 | 28,86 |
| 15 | Jón Bogason Ellingsgaard | Filskov Cykel Klub | | Opin bólkur | 03:56:58 | 28,61 |
| 16 | Jákup Johansen | Tórshavnar Súkklufelag | 1974 | Opin bólkur | 04:10:54 | 27,02 |
| 17 | Evald Rasmussen | Tórshavnar Súkklufelag | 1957 | Opin bólkur + 45 | 04:32:44 | 24,86 |
| 18 | Høgni Rúnason Øster | Tórshavnar Súkklufelag | 1972 | Opin bólkur | 04:38:00 | 24,39 |
| 19 | Hans Egholm | Tórshavnar Súkklufelag | | Opin bólkur | 04:48:25 | 23,51 |
| 20 | Eyðun Ranvaarson Jensen | Føroya Triathlonfelag | 1968 | Opin bólkur | 04:59:04 | 22,67 |